

*Grækaris var limur í løgtinginum, tá ið tað sá soleiðis út*

*sjálvbjargnir vera?*
*Alt fínt skulu vit bert frá útlondum bera,*
*meinar hann Grækaris.*

*Hvør kallar Føroyamál kloddalepa?*
*Hvør vil tað útreka og hvør vil tað drepa,*
*er tað ei Grækaris?*
*Hvør man dríta í egið reiður?*
*Tað er tann Gøtumaður vreiður,*
*Tví vorðið Grækaris!*

## Politisk kjak fyri gott 100 árum síðani

Grækaris luttekur eisini í politiska orðaskiftinum í Dimmalætting.

Tað tykist at vera lítið í bløðunum, meðan Grækaris var í tinginum. Men tann 16. juli 1881 er tó ein grein í samband við hvønn Grækaris stuðlar til eitt fólkatingsval.

Valið var millum Kap.Bærent Bærentsen og sýslumannin Clement Olsen. Báðir eru góðir menn, men tá ið hann bert kann velja annan teirra verður tað Olsen. Bærentsen verður tó valdur hesa ferð.

Eftir at Grækaris er farin úr tinginum er hann í harðligum blaðkjaki við J.H. Schrøter í samband við eitt fólkatingsval. Her sæst, hvussu politikkur eisini var tá.

## Grækaris í Dimmalætting 18. januar 1890:

Det forekommer mig, at de færøske Vælgere til Folketinget omtrent ere stillede som en Jomfru, der omringes af trende Bejlere. Dersom disse Bejlere kom med deres Ægteskabstilbud enkeltvis, kunde man maaske give sit Jaord lige saa vel til den første som til den sidste, men nu kommer de alle tre paa en Gang, og deri ligger Vanskeligheden.

Nu forudsætter jeg, at en af disse tre Bejlere trænger sig ubeskedent frem og sættende alle Høflighedshensyn til Side paa en anmassende Maade vil aftvinge hende Jaordet uden at give hende Betænkingstid. Følgen bliver da, at hun faar Afsky for ham og giver ham Kurven uden at takke for Tilbudet.

Hvad nu Venstremanden angaar, da skal jeg ikke undlade at bemærke, at Folketinget er lige saa lidt tjent med at modtage ham, som den færøske Valgkreds ved at sende ham, da han ingen politisk Betydning har og altsaa er ude af Stand til at udrette noget. Men desuagtet vil han anmasse sig Vælgernes Stemmer, og derfor har jeg lignet ham med den frække Bejler, som Jomfruen ikke tog i Betænkning at give Kurven, idet hun undlod at takke for Tilbudet.

## Schrøter svara aftur 25. januar:

J.H. Schrøter hevði verið fólkatingslimur 1884-1887, og tað er ikki við mýkindum, nú hann svarar aftur:

Det er Gregorius Johannesen, der i sidste Nr. af nærværende Blad fortæller os, hvad det var, han vilde have sagt den 28. Juli f.A. men ikke fik sagt, samt iblandt andet meddele os, at "han Schrøter ingen politisk Betydning har." Forinden man imidlertid tager hensyn til denne hans Paastand, maa man først tage undet Overvejelse, om G.J. i Virkeligheden er i Stand til at fælde nogen begrundet Dom i den Sag, som han taler om – ud over at give sin egen Stemme. Hvilken Betydning har G.J? Har han nogen sinde haft nogen Betydning?

Vi vare belemrede med ham i Lagtinget i nogle Aar, men med min bedste Vilje er jeg ikke i stand til at mindes, at han nogen sinde er fremkommet med en eneste selvstændig Tanke eller at vi have en eneste Linie i nogen færøsk Lov, Anordning eller Vedtægt fra hans Haand. Han plejede under Møderne at sidde og digte Rim eller Viser.

## Dimmalætting 15. februar 1890

Tað er heldur ikki við mýkindum at Grækaris svarar aftur:

Hr. Schrøters svar til mig er ikke andet end Chikanerier, den egentlige Sag uvedkommende, hvilket viser, at den Sag han vil forsvare, er alt andet end retfærdig. Hvor ringe Betydning jeg end efter Hr. Schrøtes Mening havde i Lagtinget, saa havde jeg dog flere oprigtige Venner i Tinget end han. Naar hr. Schrøter omtaler, at jeg under Møderne plejede at sidde og lave Viser og Rim, da er Grunden vist den, at han endnu kan huske de Snært, han plejede af faa af disse Rim, naar han bar sig galt ad under Møderne, som f. Eks dengang han anmassede sig i Ordførerposten i Ravnesagen og han, fordi Sagen ikke gik efter hans Hoved, i Hidsighed løb fra Mødet og slog Døren i efter sig med et saa Forfærdeligt Rabalder, at man knapt nok kunde høre Formandens Bjælde, der meget alvorligt lød efter ham.

Kanska kann sigast, at orðalagið í tinginum er ikki nógv batnað hesi nógvu árini, sum eru liðin.

## Yrkingarnar

Ein annar partur av virkseminum hjá Grækaris var hansara yrkingar. Hann tykist at vera sera andaligur maður og hann var sera kunnugur við Bíbliuna. Tá var ikki vanligt, at meinigur maður átti Bíbliu. Men Grækaris hevur dugað mong ørindi í henni.

Grækaris hevur heldur ikki gingið í skúla. Hann var 17 ár, tá ið fyrsti skúli kom í Eysturoynna. Tískil hevur hann sjálvur lært seg at skriva og lesa.

Men okkurt hevur kanska ligið í genunum. Grækaris og William Heinesen vóru í ætt. Katrina, dóttir umrødda Óla Jacobsen f. 1714, ein ættarfaðir Grækaris, varð gift vestur í Vágar, og gjørdist olduromma William.

Tey eldru fólkini í Gøtu mintust eisini teirra foreldur hava greitt frá, at Grækaris var ein góðir táttayrkjari.

Grækaris gav eisini út eitt yrkingasavn kallað Udvalgte Digte við gott 20 yrkingum. Tað var 46 síður. Tað er býtt í tríggjar partar. Ein partur er við søguligum yrkingum, ein við átrúnaðarligtum yrkingum og so ein partur við yrkingum til serstøk høvi (lejlighedsdigte.) Ein sera kend yrking kallaðist Snorkus's Gravsang.

Søguligu yrkingarnar vísa eisini, at Grækaris hevur havt stóran áhuga fyri tí, sum er hent úti í heimi. Hansara fyrsta yrking er um Martin Luther.

Í skaldskapinum er tað mest tær myrku og døpru síðurnar av lívinum, sum verða viðgjørdar. Kúganin av fólkinum stígur eisini ramliga fram í yrkingunum hjá Grækarisi.

## Doyði knappliga

Hesi minningarorð um Grækaris stóðu í Føringatíðindi í desember 1890 og verða endurgivin orðarætt:

"Gregorius Johannesen, kongsbóndi í Syðrugøtu, doyði 3. november snøggliga, sum hann sat í einum brúdleypi. "Gragaris" var kendur um allar Føroyar sum ein kønur rímsmiður. Hann hevði góð evnir til at yrkja, var skjótteinkjandi og stuttligur. Tí verri hevði hann ikki gingið í skúla og var ikki rættuliga kønur í tí Danska málinum, sum hann næstan altíð rímaði í. Tað var fyri uttan kingibók og kempuvísurnar mest skipsmannsvísur og aðrar vánaligar rímur, sum hann tók sær til dømis. Ta vegleiðing, sum hann kundi haft av betri vitandi monnum, bleiv meira ein skeivleiðing í tí tey mest róstu tí, sum var mest løgið fyri ikki at siga vitleyst. Fyri uttan "Udvalgte Digte" hevur hann yrkt óteljandi aðrar rímur. Ein tann besta av teimum, sum eisini er á Føroyskum máli, er tíggjundartátturin.



*Grækaris var í orrustu við Johan Hendrik Schrøter (1842-1911), sum var tingmaður 1873-1905 og fólkatingsmaður 1884-1887*

Gragaris var 1863-70 og 79-82 løgtingsmaður úr Eysturoy. Hann hevði góðan hug at fremja landsins besta og var bæði vitugur og skilagóður, uttan tað, at hann gjørdi ov mikið av tí váta slagnum."

Ja, so bersøgin kundu minningarorð vera tá í tíðini. Tá ið Grækaris er deyður er tað, at konan og dótturin flyta inn til Petru og Óla Gregersen. Orsøkin fyri hesum kann eisini vera, at tey vóru í ætt. Mamma Óla, Johanne Olesdatter, var nevniliga systkinabarn Grækaris.

Men eftir stendur, at Grækaris hevur verið ein heilt serligur persónur, sum uttan iva er verdur at minnast. Vit fara kanska seinni at tríva í okkurt av tí, hann hevur yrkt.

**Komandi partur**

I dag er tað fáir minuttir at ferðast millum Gøtu og Lorvík. Soleiðis var tað ikki tá Sofus var ungur! Millum annað hesum greiðir hann frá í komandi parti

Sosialurin